# Ronnie mitt í techno-meldrinum

PRIX

Prix Føroyar er ein tónleikakapping, sum Norðurlandahúsið í Føroyum skipar fyri í samstarvi við Føroya Undirhaldstónleikarafelag (FUT), Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Kappingin hevur verið hildin annað hvørt ár síðani 1995.

Kappingin er skipað við fimm innleiðandi umførunum, har vinnarin í hvørjum umfari kemur í finaluna. Bólkarnir, sum enda sum nummar 2 til innleiðandi umførini, skulu kappast í eini hálvfinalu, har vinnarin fær seinasta finaluplássi.

Endmálið við kappingini er at hækka støðið innan føroyskan tónleik. Kappingin vendir sær til føroyskar undirhaldsbólkar, rockbólkar og onnur við tí í hyggju, at geva vinnarunum møguleikan at spæla á útlendskum palli.

Øll tey innleiðandi umførini verða hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Finalan verður í Norðurlandahúsinum í Havn.

29 bólkar eru við í kappingini í ár. 6 bólkar sleppa í finaluna.

**1. umfar, 25. januar kl. 21.00**
Flux
S.C.A.T.G.O.H
Headache Blues Treo
Søren Søgaard
MC Hár
Human Chaos
Vinnari: MC Hár
Nummar 2: Headache Blues Tro

**2. umfar, 1. februar kl. 21.00**
Mind's Eye
Déjá Vu
onkikanndiskuterast.alt kann
Speaker
Holgar og Villmenn
Vinnari: Déjá Vu
Nummar 2: Mind's Eye

**3. umfar, 15. februar kl. 21.00**
Braquet
Crashwave
Mary's Baby
Lawetz
Krit
Masha
Vinnari: Braquet
Nummar 2: Lawetz

**4. umfar, 22. februar kl 21.00**
Makrel
Chain
Side Effect
Fluffy Toys
MMM
Páll Finnur Páll

**Garvaði trummuspælarin Ronnie Nielsen kryddar nú techno-tónleikin hjá teimum ungu tónleikarunum í Side Effect. Hann kundi verið pápi teirra, men tað er hann ikki. Hann er fosturpápi ljómborðsspælaran í bólkinum**

SIDE EFFECT
*Eyðun Klakstein*

Nýtt og gott gamalt.
Tað kundi verið yvirskriftin fyri manningina í bólkinum Side Effect. Tónleikararnir í bólkinum eru allir uttan ein blaðungir. Tey eru millum 17 og 19 ár.
Men so er tað Ronnie.
Ronnie Nielsen, sum hevur spælt trummur og sungið í alskyns bólkum í Føroyum í meira enn 25 ár. Nøvnini eru mong. Devon, Frændur, Paragraf, Black Birds, Tám og Trast – bara fyri at nevna nøkur.
Nú situr Ronnie aftan fyri trummurnar í bólkinum Side Effect.
42 ára gamal og í góðum hýri.
Hann kundi verið pápi teirra, og er tað kanska á ein hátt.
Hann er nevniliga fosturpápi ljómborðsspælaran í bólkinum, Brynjolf á Heygum, sum er sonur kendu songkvinnuna Rúnu á Heygum.
– Hetta er nakað heilt annað. Eg havi ongantíð áður spælt techno-tónleik, so hetta er fullkomiliga nýtt fyri meg, sigur royndi trummuspælarin, sum fyri tveimum árum síðani spældi í Prix-finaluni saman við bólkinum Tám.

### Meira livandi tónleikur

Bólkurin Side Effect hevur nøkur ár á baki. Fyri tveimum árum síðani var bólkurin við í innleiðandi Prix-umfarinum á Strondum, og hóast nógv hildu, at teir vóru sum ein frískur vindur, komu tey ikki víðari.
Nú royna tey aftur, og hesaferð skal tónleikurin vera meira livandi. Tey brúka forritaðar trummur, men nú verður tað saman við góða trummuspælinum hjá Ronnie Nielsen.
– Fyri einum ári síðani vildi eg ikki hoyra talan um at hava ein trummuspælara við í bólkinum, men eg havi broytt hugsan. Tað riggar væl at hava ein trummuspælara við í einum techno-bólki. Tað ger tónleikin nógv meira livandi, so tað næsta verður kanska, at vit fáa ein bassspælara við eisini, sigur Brynjolfur á Heygum.
– Vit hava ikki spælt alment við hesari manningini enn, men tað hoyrist til venjingina, at tónleikurin hevur fingið nakað afturat, síðani vit fingu ein trummuspælara uppí.

### Kostar uppvask og rudding

Tá trummuspælari skuldi finnast, fór Brynjolfur eftir einum tónleikara, sum stendur hon nær.
Fosturpápi hansara er ein av Føroya mest virdu trummusláarum, so tað var líkatil.
– Eg haldi ikki, at eg skuldi lokka hann nakað serligt. Hann segði ja mest sum beinanvegin, sigur Brynjolfur við einum stórum smíli.
– Men hann veit, hvat tað kostar. Uppvask og rudding, leggur Ronnie argandi afturat.

### Ongar konfliktir

Brynjolfur heldur, at tað er ein stórur fyrimunur at hava ein so royndan tónleikara sum Ronnie við í bólkinum.
– Vit hava skift manning eitt sindur seinastu árini, og við hvørt hava vit havt konfliktir, tí onkrir tónleikarar ikki vilja góðtaka, at vit spæla techno-tónleik. Soleiðis er ikki við Ronnie. Hann er ótrúliga professionellur. Hann roynir ikki at broyta okkum, men leggur seg eftir at spæla trummur, soleiðis at tað passar til tónleikastílin hjá okkum, sigur Brynjolfur.
Og Ronnie hevur eisini rósandi orð at siga um ungu fólkini, sum hann nú spælir saman við.
– Tey duga sera væl at gera tónleik og at spæla, so tað er bæði stuttligt og avbjóðandi hjá mær at vera við, sigur hann.
Hann vil tó ikki siga, at hann verður verðandi í bólkinum. Fyri fyrst snýr tað seg um Prix Føroyar tónleikakappingina, og klárar bólkurin at koma víðari frá innleiðandi umfarinum leygarkvøldið, so hava tey í øllum førum finaluna at venja fram ímóti.

### Hugsa um útgávu

Tey eru átta fólk, sum spæla í Side Effect. Ein forsangari, tríggir kórsangarar, tveir ljómborðsspælarar, ein gittarspælari og ein trummuspælari.
– Vit hava vant nógv hvør í sínum lagi, so at vit duga allar sangirnar væl og virðiliga. Hesa vikuna brúka vit so tíðina til at venja saman og at fáa alt sita, sigur Brynjolfur á Heygum.
17 ára gamli tónleikarin er ein tann yngsti tónleikarin, sum hevur spælt í Prixnum, og eftir Prixið í ár verður næsta uppgávan at fáa eina fløgu út.
– Tað er helst best einki at siga um, nær fløgan skal koma út, men vit ælta okkum at koma við eini útgávu, sigur Brynjolfur.


*Ronnie Nielsen saman við fostursoninum Brynjolfi. Teir báðir fara á pallin saman í Fuglafirði leygarkvøldið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*


*Ronnie Nielsen ger techno-tónleikin hjá teimum blaðungu tónleikarunum í Side Effect meira livandi. Tann roydni trummuspælarin heldur, at tað er bæði stuttligt og avbjóðandi at spæla hetta slagið av tónleiki, sum hann ongantíð áður hevur spælt*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Prixið fær spennandi gest úr London

**Áhugin fyri Prix Føroyum er stórur uttanlands, og nú hevur ein plátufelagsstjóri í London boðað frá, at hann kemur til Føroya, tá ið finalan verður í apríl mánaði**

ÚTLENDINGAR
*Eyðun Klakstein*

Tað verður gjørt nógv fyri at fáa útlendskar gestir til Prix Føroyar finaluna, og aftur hesaferð verða koma nógv fólk úr útlandinum til Føroya.
Plátufelagsfólk, journalistar, ummælarar, festivalfyrireikarar og onnur koma hendan vegin í apríl, og nú hevur ein plátufelagsstjóri í London eisini boðað frá, at hann ætlar sær til finaluna.
Talan er um stjóran á Warner Music í London, Dennis Plough.
Møguliga kemur eisini okkurt írskt umboð fyri plátufelag til Prix-finaluna.

### Nógvir fjølmiðlar

Nógvir útlendskir fjølmiðlar plaga eisini at vísa Prix Føroyar finaluni áhuga. Stóru donsku dagbløðini senda fólk hendan vegin, og íslendingar eru eisini áhugaðir.
Íslendska Rás 2 ætlar senda beinleiðis frá Prix Føroyar finaluni, og Morgunblaðið fer eisini at senda fólk til finaluna.
Sjónvarpssendingin Boogie hjá DR, sum vendir sær til tey ungu, kemur eisini til Føroya í sambandi við finaluna.
– Hetta er ein góður og bíligur háttur at marknaðarføra føroyskan tónleik í útlandinum. Vit gera nógv burtur úr at lokka lyklapersónar til Føroya, og tað vísir seg, at hesi fólk fylgja væl við føroyskum tónleiki, eftir at tey hava verið í Føroyum, sigur Fróði Vestergaard, samskipari av Prixnum.

PRIX

**5. umfar, 8. mars kl. 21.00**
Týr
Zink
Blív
Jam
Gestir
Hatespeech

**Hálvfinala, 15. mars kl. 21.00**
Allir bólkarnir, sum endaðu sum nummar 2 í teimum fimm innleiðandi umførunum, kappast um eitt pláss í finaluni

**Finala, 26. apríl**
Tann stóra finalan í Norðurlandahúsinum. Seks finalistar kappast um sigurin í kappingini og møguleikan at spæla á donskum festivalum.

**Dómarar**
10 dómarar meta um framførslurnar hjá bólkunum til tey innleiðandi umførini. Teir geva bólkunum stig fyri teir ymsu partarnar av framførsluni. Stigini hjá øllum dómarunum verða tald saman, og síðani verður vinnarin funnin. Í finaluni eru 28 dómarar.

**Vinnarar**
1995: Moirae
1997: Mark No Limits
1999: Taxi
2001: Clickhaze

**Atgongumerki**
Atgongumerki til innleiðandi umførini kunnu keypast á Kunningarstovunum kring landið, í Mylnuni í Miðvági og á Shell-støðini í Gøtudali. Eisini ber til at keypa atgongumerki á www.billetmaskinen.dk. 600 fólk sleppa inn til hvørt umfar.

**Bussar**
Í sambandi við kappingina leygarkvøldið koyra bussar til og frá tiltakinum.
Bussar fara úr Vestmanna, Sørvági og úr Havn kl. 20.00
Bussar fara av Toftum og Strondum kl. 20.30. Teir steðga ávíkavist í Leirvík og í Gøtu kl. 20.50.
Aftan á tiltakið koyra bussarnar heim aftur.

**Ferja**
Sjóvegis samband verður til Klaksvíkar kl. 03.45 av Fuglafirði. Ferðaseðlar skulu keypast í Norðoya Kunningarstovu og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

**Prix í Sosialinum**
Lagt til rættis: Eyðun Klakstein
Teldupostur: eydun@sosialurin.fo